# Fyrsti hervegur bygdur í



*Bygningurin í Mjørkadali í gerð. Oman fyri bygningin sæst Oyggjarvegurin, sum verður gjørdur samstundis. Lønarstríð tók seg upp millum ein av donsku arbeiðstakarunum og arbeiðsmannafelagið í Kaldbak, meðan húsið varð bygt. Myndaeigari: Georg Sylvest Pedersen*

**Um hernaðarsamgongan Nato ikki hevði byrjað upp á vegin niðan í Mjørkadal og niðan á Sornfelli síðst í 50-unum og fyrstu árini í 60-unum, er ilt at siga nær Havnin hevði fingið samband við bygdirnar norðanfyri**

## Føroyar mítt land



**Magnus Gunnarsson**
maggi@sosialurin.fo

Árini eftir seinna heimsbardaga bleiv nógv skrivað í bløðunum um Oyggjarvegin og um hvussu vánaligt ferðasambandið var úr Havnini til bygdirnar norðanfyri, sum tá einans var við rutubátum hjá Mjølkaforsýningini.

Úr Havnini var bert koyrandi til Hvítanesar, út á Argir, til Kirkjubøar og nakað niðan á oyggj, beint oman fyri Havnina. Tað sum var vanliga varð nevnt Gamliendi, tí vegurin niðan á oyggj endaði har. Sambandi við Norðradal og Syðradal var á hestbaki til og frá Gamlaenda.

Í greinum og lesarabrøvum verða Oyggjarvegurin og Sundsvegurin ofta nevndir saman. Tey sum búðu á Sundi og í Kaldbak vildu hava vegin at ganga tann vegin, ístaðin fyri at leggja vegin uppi í fjøllunum. Hóast nógv bleiv skrivað í bløðunum og málið ofta reist í løgtinginum, hendi ómetaliga lítið.

Um Nato ikki hevði byrjað upp á vegin niðan í Mjørkadal og niðan á Sornfelli síðst í 50-unum og fyrstu árini í 60-unum, er ilt at siga nær Havnin hevði fingið samband við bygdirnar norðanfyri. Hóast tað vóru løgtingsmenn sum miðvíst arbeiddu við málinum, gekk tað ógvuliga strilti at fáa pengar settar av á fíggjarlógini til Oyggjarvegin.



*Atløgubryggjan í Kaldbaksbotni. Eingin vegur var niðan í Mjørkadal, so Kaldbaksbotnur var nærmasta Havn. Ein rennistrongur var spentur úr Kaldbaksbotni og niðan í Mjørkadal. Myndaeigari: Georg Sylvest Pedersen*

### Natomenn hava Nato ørindi

Í 1957 vóru danskir heryvirmenn saman teknikarum í Føroyum og gjørdu kanningar, í samband við at danska verjumálaráðið hevði ætlanir um at seta eina radarstøð upp í Føroyum. 24. februar 1959 er eitt lesarabræv í blaðnum 14. September við yvirskriftini »Natomenn hava Nato ørindi« og í undiryvirskriftini stendur »Hermenn eru komnir« *Natomenn komu við Tjaldrinum í gjáramorgunin. Almenningurin veit einki um hvat hesir hermenn skulu gera her, og tá Petur Mohr Dam, løgmaður, varð spurdur um hetta á tingfundi leygardagin, segði hann seg heldur onki at vita um hetta, men legði bert afturat, at sum sjálvsagt, at Natomenn hava Nato ørindi.*